

*Mikumorgunin beyð landsstýrið fjølmiðlunum til tíðindafund um fíggjarlógaruppskotið*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Bleytu virðini raðfestast hægri

**Sambært landsstýrinum verða tey bleytu virðini raðfest ovarlaga í uppskotinum til fíggjarlóg, sum verður lagt fyri tingið í dag**

POLITIKKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Barnafrádráttin í hondina. Tímalønt sleppa heim til børnini, tá tey eru sjúk. Einligir forsyrgjarar og aðrar veikar familjur kunnu søkja um peningaligt ískoyti. Brennioljustudningur, bjálvingarstuðul og koppseting til pensionistar. Hetta eru nøkur av økjunum, sum borgarin kemur at merkja, verður fíggjarlógaruppskotið samtykt.

### Trivnaður uppraðfestast

Mikumorgunin beyð landsstýrið fjølmiðlunum til tíðindafund í Tinganesi, har greitt varð frá um hvørji øki landsstýrið ætlar at raðfesta serliga frammarlaga komandi ár, og hvussu hetta sæst aftur í fíggjarlógaruppskotinum.

Á tíðindafundinum luttóku Jóannes Eidesgaard, løgmaður, og landsstýrismennirnir Hans Pauli Strøm, Jacob Vestergaard, Bjarni Djurholm og Bárður Nielsen.

Sambært landsstýrinum verða familjan, útbúgvingarøkið, eldraøkið og samferðsluøkið raðfest ovarlaga í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2007. Hesin politiski leistur er úrslit av arbeiðsvikuskiftið hjá landsstýrismonnunum í Syðradali á Kalsoynni, har niðurstøðan var, at tað í framtíðini fer at verða sett alt størri krøv til at trivnaður, familjulív og arbeiðið ganga út í eitt og upp í eina hægri eind hjá fólki.

### Meira til útbúgving

Jóannes Eidesgaard legði fyri við at greiða frá um útbúgvingarøkið, har hann segði seg vera ósamdan við Magnusi Tausen, formann í Føroya Lærarafelag, at vánaliga úrslitið av Pisakanningini ikki sæst aftur í fíggjarlógaruppskotinum.

- Vit hava sett einar 9 milliónir av til skúlaverkið, har vit eitt nú styrkja um leiðslurnar, fáa frálæru í enskum fyrr og regulera ársverkið hjá lærarum, umframt at ein millión verður sett av eyka til eftirútbúgving av lærarum, segði løgmaður, sum tosaði fyri Jógvan á Lakjuni, sum er í Rom. Sum vit hava hoyrt áður, so metir landsstýrið ikki, at vánaliga Pisa-úrslitið bert er ein spurningur um vantandi játtan, men heldur ein spurningur um hugburð hjá leiðslum, lærarum, foreldrum og næmingum.

- Men vit hava uppraðfest útbúgving sum heild, eitt nú við 4 milliónum til sernámsøkið, einari millión til serligan tørv og einari millión til skúlabókagrunnin, sum skal nýtast til ein undirvísingarportal. Harumframt hava vit játtað 1,5 milliónir eyka til Musikkskúlan, segði løgmaður.

Hann vísti eisini á, at játtanin til miðnámsútbúgvingar verður hækkað við 9 milliónum, harav ein partur fer til økt næmingatal og fleiri lærlingapláss.

- Samanumtikið fegnast vit um, at tað ber til at raðfesta útbúgvingarøkið hægri, segði Jóannes Eidesgaard.

Spurdur, um mentanarøkið annars verður uppraðfest, segði hann, at tað kundi verið hugaligt um so var, men at tað er eitt øki, sum alla tíðina hevur tørv á hægri játtan.

- Men vit hava kortini gjørt av at hækka játtanina til mentunargrunnin við einari hálvari millión, umframt at skotið verður upp, at Tjóðpallurin fær 800 túsund krónur meira, segði Jóannes Eidesgaard.

### Børn, sjúk og eldri

Karmurin hjá Hans Paula Strøm, landsstýrismanni í Almanna- og heilsumálum verður øktur við 67,2 milliónum í uppskotinum, samanborið við fíggjarlógina 2006. Hann tók orðið aftaná løgmann, og hann hevði eitt yvirlit yvir tey øki, sum verða uppraðfest í fíggjarlógaruppskotinum.

- Vit hava gjørt av at taka familjuøkið breitt, og at hyggja eftir umstøðunum hjá einstøku familjunum at virka, við serligum atliti til veikar familjur, segði Hans Pauli Strøm.

Greitt varð frá um eitt nýtt tiltak, sum verður nevnt á fyrsta sinni í fíggjarlógaruppskotinum, ið snýr seg um, at fáa eitt barnaískoyti á 3,8 milliónir til forsyrgjarar við truplum korum.

- Í stuttum snýr tað seg um, at eitt lógaruppskot, sum heimilar at útgjalda ein serliga barnastuðul/barnaískoyti til forsyrgjarar, ið hava eina húsarhaldsinntøku undir eitt vist mark, greiddi landsstýrismaðurin frá. Og hann segði, at ætlanin er, at hetta skal verða eftir umsókn, tí vit hava ikki teir neyðugu upplýsingarnar til fyrisitingarliga at staðfesta húsarhaldsinntøku, tá eisini ógift samlivandi eru eitt húsarhald.

Annað, sum hann nevndi, vóru uppraðfestingar av stuðulsskipanini fyri familjur við brekaðum børnum á 2,2 milliónir, fyribyrgjandi heilsutænastur fyri børn og ung á 800 túsund, betri umstøður fyri Barnaheimið og aðrar stovnar fyri børn og ung fyri 1,6 milliónir. Harumframt kann verða nevnt, at ætlanir eru um, at tímalønt skulu fáa endurgjald fyri barnsins 1. og møguliga 2. sjúkradag.

Heilsuverk og heilsuátøk fáa eina uppraðfesting á 9,1 milliónir, pensjónistar og eldraøkið fáa 13,6 milliónir eyka, og her kann vera nevnt, at Samhaldsfastið hækkar útgjaldið við 800 kr. upp í 2000 kr./mðr., umframt at ætlanir eru um nýggja lóggáva um orku- og bjálvingarstuðulslán til pensjónistar.

Viðvíkjandi rúmligum arbeiðsmarknaði, rehabilitering og aktivering fær økið 2,2 milliónir eyka.

### Revsirætturin avtakast

Landsstýrismaðurin í innlendismálum, Jakob Vestergaard kundi lova, at teir fara at leggja uppskotið um felags foreldramyndugleika fyri tingið fyrsta dagin. Í tí lógaruppskotinum verður eitt nú rætturin at sláa børn avtikin, og Føroyar verða javnsettar við hini Norðanlondini á tí økinum. Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum greiddi síðani frá, at ætlanin er at umleggja barnafrádráttin, so fólk fáa hann fluttan á kontuna tvær ella tríggjar ferðir um ári.

- Endamálið við at útgjalda barnafrádráttin er, at fólk í størri mun kunnu eyðmerkja peningin og aktivt lata peningin koma børnunum til góðar, segði Bárður Nielsen.

# Sleptu útoyggjum upp á fjall einaferð afturat

**Heldur ikki á fíggjarætlanini fyri 2007, síggjast nakrar ábendingar um ein virknan útoyggjapolitikk**

POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*

- Enn sæst onki serligt til, at ætlanin er at fara undir ein virknan útoyggjapolitikk.

Tað staðfestir Olga Biskupstø, nú samgongan hevur lagt fíggjarlógina fyri næsta ár fyri Løgtingið.

Men hon staðfestir samstundis, at útoyggjapolitikkurin røkkur ikki út um samferðsluna.

- Tá ið politikarar tosa um útoyggjapolitikk, verður áhugin beinavegin vendir ímóti samfeðrsluni og tað sær út til at vera strilti at fáa politikarar at sleppa sleppa gamlari vanahugsan.

Samstundis ásannar hon eisini, at sjálvandi hevur samferðslan sera stóran týdning.

Í hesum sambandi verður arbeitt við at gera nýtt skip til Nólsoyar og Kalsoyar og tað er avgjørt góð tiltøk.

Samstundis er ætlanin at brúka tríggjar milliónir til vegir, havnir og tílík endamál í útoyggj.

- Men tað, sum útoyggjarar hava mest brúk fyri, er at tað almenna gera ein grunn við tí endamáli at fíggja vinnuligar verkætlanir á útoyggj.

Politikarar mugu ásanna, at tað er ómetaliga torført at fíggja vinnuligar verkætlanir í útoyggj, tí bankarnir vilja ikki fíggja nakað, teir ikki fáa nóg góða trygd afturfyri. Og í útjaðaranum er trygdin sjáldan ella ongantíð nóg góð.

- Tí er tað neyðugt at gera ein grunn, sum burturav skal fíggja verkætlanir í útoyggj.

Samskiparin hjá Útoyggjafelagnum sigur, at tað skal ikki so nógv til.

- Einaferð hevði verið nevnt at gera ein grunn við 24 milliónum í. Ein slíkur vinnuframagrunnur til útoyggjar hevði gjørt undurverk, men ein minni upphædd hevði eisini rokkið langt, tí tað skal onki til.

### Royna at sleppa undan tunnunum

Eitt, sum fólkið í útoyggj hevur stríðst við í mong ár, er trupulleikin at fáa olju til varma í húsunum. Sum er, verður at flutt til útoyggjarnar í tunnum og so mugu tey sjálvi baksast við at fáa oljuna í tangan.

Næsta ár ætlar Landsstýrið at seta 500.000 krónur av fyri at sleppa undan hesum trupulleika.

Tað, sum liggur í kortunum er, at nú skal Vaktar- og Bjargingartænastan flyta oljuna út í útoyggjarnar í tangum og at pumpa oljuna upp í tangar, sum verða settir undir liðina á tangunum hjá SEV á útoyggj og so skal SEV átaka sær trygdina.

So er ætlanin, at ein lítil traktorur við tangalast skal koyra oljuna til húsini, so hvørt brúk er fyri tí, ella leiðing verður løgd í hvørt hús.

Men har er ein stórur knútur eftir at loysa og tað er, hvør skal fíggja og eiga oljuna, sum verður pumpað í tangarnar.

- Oljufeløgini vilja ikki eiga oljuna, tí tað er ov dýrt og tað sama sigur SEV.

Tað, sum tað helst verður til, eru, at kommunurnar sjálvar skulu keypa oljuna og síðani selja hana aftur til húsarhaldini í smáum.

- Men Kommunurnar hava sagt nei, tí tær hava ikki ráð til at keypa olju fyri hálvar og heilar milliónir, sum tær síðani selja aftur í smáum, tí tað er øll fíggjarlógin hjá teimum.

- Tí er tað enn ein spurningur, hvat hetta endar við, ásannar samskiparin hjá Útoyggjafelagnum.

Tí bíða tey á útoyggj spent eftir orðaskiftinum í Løgtinginum hesar dagfarnar um fíggjarlógina fyri næsta ár.

Og Útoyggjafólk vil nú hava greið boð frá politikarunum, um ætlanin er at varðveita búseting í útoyggj ella ikki

- Er politiskur vilji ikki til staðar fyri at hava fólk búsett á útoyggj, heitir Útoyggjafelagið inniliga á Føroya Løgting um at skipa so fyri, at neyðug stig verða tikin til at avtaka útoyggjarnar á ein virðiligan hátt fyri tey, sum eru búsett á útoyggj; tí tað er ein óverdug støða og til lítlan sóma fyri umdømi Føroya at niðurpína útjaðaran og síðani vóna, at fólk flyta av sær sjálvum, segði Útoyggjafelagið kortsíðani í skrivi til Løgtingið.